# Føroyingar millum mu

Frá 7. til 17. juli 2005 skipaði føroyski missiónsfelagsskapurin "Samverkamenn" fyri eini ferð til Birmingham í Onglandi at boða kristna gleðiboðskapin fyri asiatum og muslimum saman við fólki frá OM-miðstøðini í býnum




*Føroyska ferðalagið uttan fyri moskuna vit vitjaðu í Birmingham. Aftara rað f.v.: Bergur Nónlett, Glyvrar, Markus Sørensen, Viðareiði, Hallstein Jacobsen, Klaksvík, Sjúrður Olsen, Tórshavn, Eifinn Gunnarsson, Kollafjørður, Janus Gunnarsson, Kollafjørður, og Høgni Johannesen, Birmingham.*
*Fremra rað f.v.: Óluva Fuglø, Norðdepil, Magnus Gunnarsson, Tórshavn, Signa Johannsen, Klaksvík, og Regin Gunnarsson, Kollafjørður*

TRÚBOÐAN

*Myndir og tekstur:*
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

**Birmingham:** Tá ferðalagið upp á 10 fólk møtti í floghavnini í Vágum hósdagin 7. juli, hoyrdu vit, at okkurt var hent í London, bumbur vóru brostnar, og fleiri fólk høvdu latið lív.

Vit skuldu flúgva til London umvegis Aberdeen og síðan koyra í bussi til Birmingham, og vistu vit tí ikki, um atsóknin fór at ávirka ferðina.

Meðan flogfarið hjá Atlantsflog var í Aberdeen, fingu vit at vita, at orsakað av bumbuspreingingunum var øll almenn ferðsla støðga í London, og vit vóru vælkomin at koma heim aftur við flogfarinum til Føroya. Men avgerð varð tó tikin um at fara til London, tí ein OM-bussur kom eftir okkum.

Vit komu til OM-miðstøðina í Birmingham, har vit skuldu búgva, í øllum góðum. Miðstøðin í Birmingham kallast OM-Luke, OM stendur fyri altjóða kristna missiónsfelagsskapin Operation Mobilisation, og Luke stendur fyri Love United Kingdom Evangelism. Miðstøðin varð sett á stovn sum venjingarmiðstøð hjá OM fyri Evropa, men arbeiðir í dag eisini lokalt í Birmingham. OM er sami felagsskapur sum eigur trúboðanarskipini Logos II og Doulos og nú hava keypt gomlu Norrønu frá Smyril Line, sum hevur fingið navnið Logos Hope.



*Høgni Joannnesen tulkar islamskan leiðara í eini mosku í Birmingham*

## Birmingham

Birmingham er næststørsti býur í Onglandi við umleið 3 milliónum íbúgvum. Í sjálvum miðbýnum eru nógvir stásiligir handils- og skrivstovubygningar, og nógvir eru í gerð. Serliga eyðkend er Bullring-handilsmiðstøðin, ið sigst at vera størsta handilsmiðstøð í Evropa. Ein partur av hesi handilsmiðstøð er bygdur sum ein risastórur bygningur við rundum brikkum allan vegin runt, og stendur hesin sermerkti nútímans bygningur í týðuligum mótsetningi eina gamla vakra kirkju, ið stendur beint við síðuna av.

Arbeiðið millum muslimar gongur fyri seg á ymiskan hátt, m.a. við at seta upp bókaborð í gongugøtuni í miðbýnum. Eisini verða ymisk smárit latin teimum, sum ganga framvið. Nógv fólk støðga á og koma yvir til bókaborðið og fáa eina samrøðu við OM-fólkini. Samrøðurnar við muslimar eru ofta harðmæltar og verða ógvuliga drúgvar, har báðir partar leggja síni sjónarmið fram og prógva tey, við skriftbrotum úr Bíbliuni ella Koranini. Tá hevur tað stóran týdning, at tey sum standa við borðini eru væl fyrireikað.

Fyri at kunna arbeiða millum musimar hevur tað stóran týdning at seta seg inn í teirra mentan, trúgv og tað sum teir standa fyri. Á OM-miðstøðini verður undirvíst um Islam og islamsku mentanina.

Leygarkvøldið 9. juli, tveir dagar eftir bumbuatsóknirnar í London, avbyrgdi løgreglan miðbýin í Birmingham, og fleiri túsund fólk vórðu flutt burtur í sambandi við eina bumbuhóttan. Nógvir vegir vóru avbyrgdir, og ferðslan var tarnað. Vit sóu, at tyrlur sveimaðu yvir miðbýnum. Men tíbetur varð eingin bumba funnin.

## Alum Rock býarparturin

Ein annar partur av arbeiðinum gongur fyri seg í økjum, har nógvir muslimar búgva. OM í Birmingham hevur fyri kortum yvirtikið ein samkomubygning í býarpartinum "Alum Rock", har umleið 95 prosent av íbúgvunum eru muslimar. Fólkini, sum gingu í samkomuni har, eru flutt og ganga nú í øðrum samkomum og kirkjum í býnum. Ætlanin er, at føroyski missiónsfelagsskapurin Samverkamenn í framtíðini skal arbeiða millum muslimar í hesum býarparti. OM setur á stovn samkomur, men teir reka ikki samkomur sjálvir.

At koma til Alum Rock býarpartin er sum at koma til eitt arábiskt land; húsini er tey eyðkendu ensku múrsteinshúsini, flestu íbúgvarnir eru asiatar, og býarparturin er merktur av teirra mentan. Har eru islamskar moskur, og t.d. selja klædnahandlarnir, at kalla bert tey klæðini, sum asiatar nýta. Nógvar av kvinnun-